# Miðnámsrit

24 mars 2022

## Um blaðið

Umleið 20% av øllum næmingum hava tørført við at læra at rokna, og ein triðingur av hesum er talblindur. Fyrr varð hildið, at tey, ið ikki dugdu at rokna, høvdu lágan intelligens, men so er ikki. Tað er vanliga góðtikið at halda, at støddfrøði er trupul og ómøgulig at læra, men eisini tað er ein myta.

Ikki er neyðugt, at allir tímar í skúlanum skulu haldast inni í einari skúlastovu. Nógvir møguleikar eru uttan fyri skúlan. At vitja Listasavnið er ein.

Miðnám skal byggja brúgv millum fólkaskúla og víðari útbúgving. Tí eigur samstarv á miðnámi at vera minni kooperativt og meiri kollaborativt.

Lærutilfarið í føroyskum miðnámsskúlum er sum heild danskt. Ein kanning vísir, at næmingar á miðnámi hungra eftir føroyskum tilfari.

Hvør ger av, hvørji evni verða tikin fram í undirvísingini, og hvussu tey verða viðgjørd? Hvussu er vorðið við sokallaða metodufrælsinum hjá lærarum?

Galdandi skipan á miðnámi er frá 2013. Forkvinnan í YF heldur, at tíðin búgvin at enduskoða bæði kunngerðir og sáttmála.

Blaðstjórn: Olav Absalonsen og Tórður Johannesarson

# Innihaldsyvirlit

Talblindir næmingar – hvat, hví og hvussu? Rakul Napoleonsdóttir ............................ 3

Støddfrøði er komin í ringt orð. Tórður Johannsearson ............................................... 8

Listasavn Føroya – eitt ríkt tilfeingi á miðnámi. Solveig Hanusardóttir Olsen ............ 12

Samstarv í undirvísing og læring. Olav Absalonsen ..................................................... 16

Næmingar á miðnámi sakna føroyskt lærutilfar. Tórður Johannesarson..................... 21

Er metodufrælsið hótt? Jón í Haraldsstovu ................................................................ 24

Miðnámsskúlaútbúgvingin má endurskoðast. Birna Heinesen .................................. 30

# Talblindir næmingar – hvat, hví og hvussu?

Rakul Napoleonsdóttir

**Í hesi grein verður ljós varpað á teir næmingar, ið hava serligar avbjóðingar í støddfrøði og øðrum lærugreinum, har tøl og talmongdir hava týdning. Fyri nøkrum árum síðan var vanlig fatan, at næmingar, ið ikki dugdu at rokna, høvdu lágan intelligens og vóru ikki skikkaðir til miðnám ella hægri lestur. Nú er vísindin samd um, at talblindni (dyskalkuli) og orðblindni (dysleksi) ikki standast av avmarkaðum evnum at hugsa, skilja og læra, men eru harafturímóti íbornir neurologiskir veikleikar, ið skúlaskipanir víða hvar eiga at taka í álvara.**

Støddfrøði verður roknað sum ein tann størsta og týdningarmiklasta lærugreinin í skúlaskipanini. Allir næmingar hava ikki eins góðan hug til støddfrøði, og allir næmingar hava ikki eins lætt við at læra støddfrøði. Soleiðis hevur tað altíð verið, og hetta hevur verið roknað sum púra vanligt.

Tey, ið hava kannað próvtøkuúrslit í støddfrøði í ymiskum londum farnu árini, siga, at millum 15 og 22 prosent av øllum næmingum hava trupulleikar við at læra støddfrøði, og at henda laka læruúrtøkan kemur til sjóndar í ársroyndum og próvtøkuúrslitum.

Tey, ið hava granskað í sernámsfrøðiligum spurningum á fólkaskúla- og miðnámsskúlaøkinum, siga, at teir næmingar, ið ikki duga støddfrøði eins væl og javnaldrar, skulu ikki setast í sama bólk, men harafturímóti skiftast sundur í tveir ymiskar bólkar. Hesir bólkar eru:

- Næmingar, ið eru talblindir; enska heitið er “developmental dyscalculia”
- Næmingar, ið hava trupulleikar við støddfrøði av øðrum orsøkum; enska heitið er “mathematical learning difficulties”

Niðanfyri verða bólkarnir viðgjørdir hvør sær.

## Næmingar, ið eru talblindir

Leiðandi granskarar siga, at millum 5 og 7 prosent av øllum næmingum eru talblindir. Lutfallið millum gentur og dreingir er 1:1. Hetta merkir, at í hvørjum skúlaflokki kunnu sita ein, tveir ella tríggir næmingar, sum ikki megna teir mest grundleggjandi førleikarnar í støddfrøði og tískil hava trupult við:

- at leggja tøl saman
- at draga frá

- at falda
- at býta
- at skyna klokkuna
- o.s.fr.

Tá ið næmingarnir ikki megna grundleggjandi aritmetikk, sigur tað seg sjálvt, at teir eru púra fyri ongum, tess longri teir koma í skúlaskipanini.

Tað, ið eyðkennir næmingar, ið eru talblindir, er, at teir á øðrum økjum og fakligum mótum eru eins væl fyri og javnaldrarnir. Teir hava eins lætt við at læra mál og onnur. Teir duga eins væl at lesa, greiða og greina tekstir. Teir hava eins stórt innlit í søgulig og samfelagslig viðurskifti. Teir standa seg eins væl í skapandi lærugreinunum og í ítrótti. Teir hava eins nógvar vinir og eru eins virknir á sosialu miðlunum, o.s.fr. Tað er bara, tá ið teir skulu fáast við tøl, at teir smokka niðurímillum og krevja serligt námsfrøðiligt uppmerksemi.

Talblindni var fyrr í tíðini sett í samband við lágan intelligens og uppfatað sum eitt tekin um menningartarn. Mongu søgurnar um, at talblind fólk hava skarað framúr á mongum øðrum økjum, hava punkterað hesa mytuna, og í 21. øld verður talblindni lýst sum ein psykiatrisk diagnosa, sum hevur síni egnu sjúkueyðkenni.

Talblindni er ein nógv nýggjari diagnosa enn orðblindni, og av somu orsøk vita granskarar ikki eins nógv um talblindni, sum teir vita um orðblindni. At granskingarøkið er nýtt, merkir eisini, at mongdin av hjálparamboðum, sum eru ment til næmingar, ið eru talblindir, er lutfalsliga avmarkað og fábroytt.

Leiðandi granskarar eru samdir um, at orsøkin til at nakrir næmingar eru talblindir er, at teir hava ein viðføddan, neurologiskan veikleika í heilanum. Hetta merkir, at teir partar av heilanum, ið eru serliga virknir, tá ið ein fæst við talviðgerð, hava niðursett virkisføri ella eru ikki mentir eins væl og aðrir partar av heilanum.

Ein hevur kunnað staðfest, hvørjir partar av heilanum eru ávirkaðir, við at nýta neurologiskar kanningarhættir. Ein hevur bæði:

- kannað heilan hjá fólki, ið hava fingið heilaskaða og hareftir hava mist ein førleika – nevniliga førleikan at skilja tøl og at fáast við tøl
- skannað heilan hjá næmingum, ið eru talblindir, meðan teir loysa eina uppgávu í støddfrøði, og samanborið heilavirksemið hjá hesum somu næmingum við heilavirksemið hjá næmingum, ið ikki eru talblindir, tá ið hesir loysa somu uppgávu

Ein stórur partur av teimum næmingum, ið eru talblindir, hava talblindni sum høvuðstrupulleika – og sum einasta psykiatriska trupulleika. Men kanningar vísa, at talblindir næmingar kunnu eisini hava samdiagnosur. Tær mest vanligu eru:

- ADHD
- orðblindni
- epilepsi

## Næmingar, ið hava trupulleikar við støddfrøði av øðrum orsøkum

Kanningar vísa, at umframt teir næmingar, ið hava trupulleikar við støddfrøði, tí teir eru talblindir, hava millum 10 og 15 prosent av øllum næmingum trupulleikar við støddfrøði av øðrum orsøkum. Høvuðsorsøkirnar eru:

- at teir ikki hava havt nóg góðar lærarar í støddfrøði gjøgnum skúlagongdina og hava tískil ikki lært grundleggjandi støddfrøðiførleikar
- at foreldur teirra hava lítla og onga útbúgving og hava tískil ikki verið før fyri at stuðla teimum gjøgnum skúlagongdina og hjálpt teimum við heimaarbeiði
- vantandi motivatión
- angist fyri støddfrøði

Sum sæst omanfyri, eru tað ikki neurologiskar orsakir, ið gera, at hesir næmingar ikki standa mát í støddfrøði. Og hesir næmingar hava av somu orsøk tørv á einum øðrum pedagogiskum stuðli enn næmingar, ið eru talblindir.

## Talblindni – hvussu verður diagnosan sett?

Tey, ið undirvísa í støddfrøði, gerast rættuliga skjótt varug við, hvørjir næmingar hava serligar avbjóðingar í lærugreinini. Í londum, ið hava givið talblindni ans seinnu árini, hevur ein ment fýra sjálvstøðugar og tó samanhangandi kanningartilgongdir í royndini at fáa eyga á henda málbólkin so tíðliga í skúlagongdini sum gjørligt:

- Ein screeningstest: Allir næmingar í einum flokki verða bidnir um at loysa einfaldar rokniuppgávur, har teir skulu telja tøl, leggja saman, draga frá, falda, býta, o.s.fr.
- Einstaklingsrættað test: Teir næmingar, ið hava stórar trupulleikar í screeningstestini, fáa eina serliga test, har teir skulu loysa fleiri ítøkiligar uppgávur, ið skulu vísa, hvør høvuðstrupulleikin er
- Eygleiðing: Ein serkønur persónur fer inn í støddfrøðitíma at eygleiða viðkomandi næmingar, meðan undirvísingin er. Endamálið er at fáa eyga á, hvussu næmingurin tekur lut í undirvísingini, og at finna fram til, hvørjar mannagongdir hann hevur ment fyri at fjala út yvir avbjóðingarnar

- Ein samrøða við allar teir lærarar, ið undirvísa næminginum, fyri at kunna staðfesta í hvørjum lærugreinum næmingurin stríðist

Tað finnast nógvar screeningstestir, ið hava til endamáls at sálda tey, ið hava trupulleikar við støddfrøði, frá øðrum. Men fáar av hesum testum eru autoriseraðar – tað er, at tær eru mentar av fakfólki og eru av slíkum slagi, at tær kunnu sigast at vera eftirfarandi (validar) í sernámsfrøðiligum høpi.

Tær screeningstestir, ið eru á marknaðinum, eru eisini eitt sindur ymiskar frá landi til land. Og alt hetta ger screeningsarbeiðið eitt sindur fløkt og trupult at fáast við og at seta í verk.

## Hvønn pedagogiskan stuðul hava talblindir næmingar tørv á?

Tey, ið granska í talblindni, eru samd um, at tess fyrri diagnosan verður sett, tess størri møguleikar eru til at hjálpa og vegleiða teir næmingar, ið eru talblindir.

Mælt verður tí til, at ein longu í barnagarðs- og forskúlaaldri skal fremja screeningar av øllum børnum.

Tað pedagogiska tilboðið, ið verður veitt, eigur bæði at verða tongt at aldursbólki og at næminginum sjálvum. Næmingar eru ymiskir – teir hava ymiskar læristílar og læristrategiir.

Tey pedagogisku tilboð, ið verða givin, eru ofta tongd at hesum leiðreglum:

- Næmingalagað undirvísing. Tú byrjar undirvísingina á tí stigi, næmingurin er á – og ikki á tí floksstigi, hann hoyrir til
- Stuðulstímar, sum hava neyvt endamál. Ein arbeiðir bæði við ávegismálum og endamálum
- Uppgávur, ið talblindir næmingar fáa, skulu vera sera neyvt orðaðar. Næmingurin sær ítøkiliga og stigvíst, hvat verður væntað av honum

Afturat hesum roynir ein at menna amboð og funkur, ið kunnu stuðla talblindum næmingum at sleppa inn í støddfrøðiliga heimin, og at síggja veruleikan við støddfrøðiligum brillum. Á hesum móti hevur ein øll tey hjálpitól, ið seinnu árini eru ment á dysleksi-økinum, sum fyridømi.

## Hvussu eru útlitini, um einki verður gjørt til at stuðla talblindum?

Av tí at talblindni er ein lutfalsliga nýggj diagnosa, hava vit avmarkaða vitan um, hvussu tað gongur hjá hesum málbólki á útbúgvingar- og starvsleiðini seinni í lívinum.

Tey, ið eru serkøn á økinum, vísa tó á, at talblindir næmingar trívast verri enn floksfelagarnir í fólkaskúlanum og á miðnámi, tí tað er so svárt og eyðmýkjandi at kenna seg sum ein sibba í hvørjum einasta støddfrøðitíma.

Somu serfrøðingar vísa á, at fólk, ið eru talblind, eru í størri vanda fyri ikki at gjøgnumføra eina miðnámsútbúgving og eina víðari útbúgving, tí førleikin at fáast við tøl er so grundleggjandi í allari skúlaskipanini. Og endar ein uttan fyri skúlaskipanina, er øktur vandi fyri, at ein seinni í lívinum endar uttan fyri arbeiðsmarknaðin. Hetta merkir, at talblindni kann verða (og er ofta) ein trupulleiki, ið ávirkar alla lívsleiðina.

## Keldur

Mononen, R. & Lopez-Pedersen, A. (2019): Matematikkvansker. Í: *Specialpædagogik*. Cappelen Damm Akademisk.

Price G. R. & Ansari, D. (2003): Dyscalculia. Characteristics, causes ans treatments. *Numeracy 6 (1).*

Shalev, R. (2004): Developmental dyscalculia. *Journal of Child Neurology, 19 (10).*

# Støddfrøði er komin í ringt orð

Tórður Johannesarson

**Tað er umráðandi, at vit ansa eftir, hvussu vit tosa um støddfrøði. Vit hava sum samfelag fortalt og fortelja eina mytu, at støddfrøði er trupult at læra.**

Nógvir lærarar í støddfrøði kæra seg um, at stigið í støddfrøði er ov lágt hjá næmingunum. Fyri stuttum kom fram, at ein rúgva av næmingum, ið ganga á CBS (Copenhagen Business School) taka eyka skeið í støddfrøði, tí at teir megna ikki at fylgja við í undirvísingini. Spurningurin er, hví tað man vera so. Ein orsøk kundi verið, at fólk eru von við at tosa um støddfrøði sum nakað, ið er sera torført.

Maria Østergaard undirvísti í støddfrøði í fólkaskúlanum í nøkur ár. Hon upplivdi, at tað var eitt slag av mótvilja ímóti støddfrøði. Tá ið hon tosaði við fólk og nevndi, at hon undirvísti í lærugreinini, søgdu fleiri: “gott, at tað ikki eri eg!”. Tá ið hon er úti á matstovu og etur saman við vinkonunum, og rokningin skal býtast, mæla tær ofta skemtandi til, at Maria má taka sær av høvuðrokningini.

Tað undrar Mariu, at hetta er so, tí at støddfrøði er sera nógv brúkt, og er ein nýtilig vísindagrein, sum byggir á logiskar skipanir. Hon er sum heild so neutral, sum nakað kann vera, og er í veruleikanum ein av hornasteinunum í okkara siðmenning, sum gongur líka aftur til gamla Grikkaland. Maria setti sær fyri at kanna, hví fólk hava so stóran mótvilja móti støddfrøði. Eftir at hava undirvíst í fólkaskúlanum gjørdi hon av at fara at lesa á universitetinum. Tað endaði við, at hon skrivaði eina bók, sum viðgjørdi evnið um ótta fyri støddfrøði.

Maria sigur, at tað sum heild er sosialt góðtikið, at tað er torført at læra støddfrøði og hava mótvilja ímóti lærugreinini. Sjálvt um óttin fyri støddfrøði ikki er ein læknalig diagnosa, sum heilivágur skal gevast fyri, er hann rættiliga útbreiddur og viðurkendur. Hesin óttin kann gera, at fólk verða virkislamin, tá ið tey sita við eini uppgávu í støddfrøði. Summi geva rættiliga skjótt upp, onnur blíva ill, og uppaftur onnur nokta at taka móti hjálp.

Óttin fyri støddfrøði byggir ofta á, at fólk halda, at vísindagreinin er torfør. Men nógv bendir á, at evnini eru ikki tey somu at læra støddfrøði, sum tey vóru fyri heilt fáum árum síðan. Í januar í 2020 kom fram, at fleiri túsund næmingar á CBS taka eyka skeið

í støddfrøði. Lektarin í mikrobúskapi, Leslie Christensen, segði við Berlingske Tidende, at 70-80% av næmingunum á fyrsta ári ikki duga nóg væl støddfrøði. Teir eru stutt sagt ikki førir fyri at skilja eina búskaparliga lærubók, tí at teir ikki eru nóg stinnir at rokna. Í eini frágreiðing frá danska kenslumálaráðnum blivu fleiri hundrað fólkaskúlalærarar, miðnámsskúlalærarar og lærarar á universitetunum bidnir um at meta um stigið hjá næmingunum, og um tað er týðiliga lægri nú enn fyrr. Á miðnámi søgdu 38% av lærarunum, at stigið var greitt lægri nú enn fyrr. Og 47% av lærarunum á universitetunum søgdu, at stigið var greitt lægri hjá næmingum, tá ið teir byrja.

Hví duga tey ungu ikki so væl støddfrøði? Hví er mótstøðan móti hesi lærugrein so útbreidd? Eingin gransking vísir, at støddfrøði er verri at læra enn alt møguligt annað. Har mugu vera aðrar orsakir, og tað eru tað eisini. Tað snýr seg um talfatan, lummaroknarar og siðvenjur at undirvísa í lærugreinini. Tað snýr seg eisini um mentan, tí at tað snýr seg um, hvørjar søgur verða sagdar um støddfrøði.

Professarin á Keypmannahavnar Universiteti, Carl Winsløw, sigur, at hesar kanningar benda greitt á, at grundleggjandi vitan um støddfrøði hjá donskum børnum er minkandi, og at tað gongur skeiva vegin. Orsakirnar til hetta eru fleiri.

## Hví duga næmingarnir so illa at rokna?

Næmingarnir duga væl at skilja úrslitið í einum roknistykki, men duga ikki so væl at rokna út, hvat liggur aftanfyri. Trý viðurskifti verða kannað: um teir duga at seta eitt roknistykki upp, so teir kunnu loysa eina uppgávu, um teir duga at rokna sjálvt roknistykkið, og at enda, um teir megna at tulka stykkið. Teir duga væl at tulka roknistykkið, tað er, at teir duga at finna útav, hvat úrslitið merkir. Teir duga næstbest at seta sjálvt roknistykkið upp. Teir duga ringast at rokna roknistykkið út.

Trupulleikin stingur seg serliga upp, tá ið teir skulu rokna brot ella loysa líkningar við stavum (algebra). Hetta merkir, at ungdómurin hevur trupulleikar at skilja mekanismunar í grundliggjandi roknimetodum. Professarin Uffe Jankvist lýsir tað við einum dømi um eina líkning, sum kundi sæð soleiðis út:

$$2x = 4$$

Teir skulu finna útav, hvat x er í líkningini. Tað týdningarmikla er, hvussu næmingarnir koma fram til úrslitið. Skilja teir sjálva metoduna? Tað er har, sum tað haltar, sigur Uffe.

Tað kann vera, at teir fáa rætta úrslitið, men teir koma fram til tað, tí at teir gita, at x má vera 2, tí at tvær ferðir tvey er 4. Teir kenna ikki metodurnar, duga ikki at grundgeva støddfrøðiliga. Hetta vísir, at teir duga at tulka úrslit, men duga ikki at rokna seg fram til tað.

Og tað hjálpir ikki, at vit fáa meira og meira hjálp frá lummaroknaranum. Tað er vorðin ein siðvenja á miðnámi at brúka elektronisk hjálpitól at loysa líkningar og annað, hetta kann vera ein lummaroknari ella eitt telduforrit. Hesi hjálpitól verða eisini meir og meir brúkt í fólkaskúlanum.

Onkursvegna er samfelagið á vandakós. Nýggj tøkni er komin, sum hevur yvirtikið eitt gamalt handverk. Spurningurin er, um hetta aldagamla handverkið er við at fara fyri bakka. Vit kunnu spyrja, um tað er snilt at lata tøknina taka yvir. Um vit velja tað, so mugu vit gera okkum greitt, hvat fyri uppgávu tøknin ger fyri okkum, vit mugu vera tilvitað um grundleggjandi fatan av tølum og rokniteknikki, sigur Uffe at enda.

## Undirvísing og lærutilfar

Tá ið vit skulu læra støddfrøði, er týdningarmikið at leggja eitt rætt grundarlag so skjótt sum gjørligt, og har er fólkaskúlin ein grundarsteinur. Dømi eru úr japanskari undirvísing í støddfrøði; tey hava ikki klassiska tíman, har næmingurin fær eitt pappír frá læraranum og skal sita og rokna nakrar standarauppgávur. Ístaðin arbeiða teir við einari stórari uppgávu ein heilan skúlatíma, sum teir skulu loysa. Japanskir lærarar arbeiða sera nógv saman, leggja í felag undirvísingina til rættis, eygleiða undirvísing hjá hvør øðrum og reflektera í felag um undirvísingina.

Nakað tað sama verður gjørt í Singapor, har undirvísingin í støddfrøði er meira "stramm" enn í Norðurlondum. Í Singapor hongur alt tað, ið lærarin ger í triðja flokki, saman við tí, sum næmingarnir skulu læra í fjórða flokki o.s.fr.

Í Danmark er ein av trupulleikunum, at námsætlanirnar eru fullar av orðum, sum eingin skilir, hesi orð eru heldur ikki serliga neyv. Carl Winsløw sigur, at danir áttu at havt eina strategi fyri tøl, sum rakk frá fyrsta flokki og til 3.s á miðnámi. Samstundis áttu lærubøkurnar at verið tillagaðar. Hann nevnir sum dømi, at einir 30-40 rithøvundar hava skrivað lærubøkurnar til japansk børn og ung. Ein skipað og áhaldandi eftirmeting fer fram, so tær alla tíðina verða betraðar.

## Støddfrøði - umdømið

Vit mugu eisini hugsa okkum betur um, hvussu vit tosa um støddfrøði. Neiligar hugsanir um lærugreinina kunnu blíva sjálvstyrkjandi. Hesar framsetingar kunnu ávirka avrikini hjá næmingunum. Tað skal tó eisini ein vilji til, tí at í støddfrøði er ein rúgva av reglum, sum skulu goymast í minninum og skulu lærast uttanat. Hetta er kanska ikki stuttligt, men tað er neyðugt.

At næmingar, sum ganga á CBS tosa um støddfrøði sum nakað, ið teir helst vilja sleppa undan, kemur ikki óvart á Mariu Østergaard. Hon plagar at hava fyrilestrar um ótta fyri støddfrøði, og til hesi tiltøk vísir hon t.d. eitt brot úr einari sjónvarpssending, har mamma og dóttir baka og flennandi greiða frá, at tær duga ikki støddfrøði. Eitt annað dømi er um eina Barbie-dukku, ið bara dugir at siga "Math class is tough!"

## Hvat kann gerast?

Hetta sama, sum verður ført fram, munnu vit eisini kenna aftur í Føroyum. Danir hava tikið trupulleikan í stórum álvara. Danska kenslumálaráðið stovnaði í 2020 ein depil, har fólk sita saman og royna at finn út av, hvussu undirvísingin í støddfrøði kann mennast. Málið er at fáa betri undirvísing á øllum útbúgvingarstigum. Teir byrja við børnum frá null til seks ára aldur fyri at tryggja grundleggjandi støddfrøðiligt dannilsi. Tað kundi verið eitt hugskot, at vit gjørdu tað sama í Føroyum.

## Keldur

Gitte Klein. *Ávegis til talgildan demens*, Miðnámsrit 6, 2015.

Jenny Anderson. *Øll kunnu læra at rokna*, Miðnámsrit 17, 2018.

Olav Absalonsen. *Hví duga børn í Eystur-Asia betur at rokna enn børn í Vesturlondum*, Miðnámsrit 9, 2016.

Sidsel Hoe. *Danskernes matematik-kompleks har fået lidt for godt fat. Det er på tide med et opgør*, zetland.dk 5/2 í 2020.

Tórður Johannesarson. *Støddfrøði á føroyskum*, Miðnámsrit 3, 2014.

# Listasavn Føroya – eitt ríkt tilfeingi á miðnámi

Solveig Hanusardóttir Olsen

**Komið út um skúlagátt og fáið tykkum eina læruríka og serstaka uppliving við at seta myndlist á tímatalvuna á Listasavni Føroya. Savnið kann brúkast á alskyns hátt í undirvísingini í nærum øllum lærugreinum. Allar skúlavitjanir eru ókeypis.**

Í náttúruvøkrum umhvørvi í Viðarlundini liggur Listasavn Føroya, tjóðlistasavnið, har til ber at uppliva tað besta av føroyskari myndlist. Nógv vitja savnið, og millum teirra eru skúlaflokkar, sum ofta koma á gátt - eisini flokkar á miðnámi, og nærum einki mark er fyri, hvussu lærarar kunnu brúka Listasavn Føroya í undirvísingini.

Eg havi starvast á Listasavni Føroya síðani 2014 og havt nógvar rundvísingar. Eg havi ivaleyst heilsað uppá fleiri tykkara, sum hava vitjað savnið. Hetta skúlaárið (21-22) havi eg undirvíst í føroyskum á Glasi. Skiftið frá at vera savnsvørður til at vera miðnámsskúlalærari hevur váttað mína sannføring um, at listin veruliga kann seta alskyns evni á breddan og er sanniliga viðkomandi í undirvísingini. Eitt samspæl millum myndlist og ta meira siðbundnu undirvísingina gevur næmingunum eitt gott og fjølbroytt grundarstøði fyri læring.

## Um savnið

Listin bjóðar einum vælkomnum, so skjótt ein traðkar inn á Listasavn Føroya. Í forhøllini eru listaverk, sum antin eru partur av serframsýningini, sum er frammi í løtuni, ella ein framsýning í sjálvum sær. Forhøllin leiðir inn í ta føstu framsýningina, har føroysk myndlist verður sett í hásæti. Fasta framsýningin er sett saman av 12 ymiskum evnum við støði í føroyskari list, søgu og mentan. Millum teirra eru havið, landslagið, steinar, portrett, dýr og grafikkur. Her ber til at uppliva fleiri enn 250 listaverk í ymiskari tøkni. Tey flestu verkini eru málningar, og umframt hesar eru standmyndir, grafikkur og installatiónir. Listin fevnir um eitt breitt tíðarskeið, frá 1840-árunum til í dag.

Serframsýningar eru fastir tættir á Listasavni Føroya. Hetta eru skiftandi framsýningar, sum kunnu upplivast í nakrar mánaðir og taka ofta støði í einum evni ella einum listafólki. Á skránni frá mars og til mitt í juni í 2022, er “Landslagið í broyting”. Á framsýningini verður føroysk landslagslist gjøgnum tíðina sýnd fram, og við tí verður ljós varpað á, hvussu náttúran í listini endurspeglar broytingar í føroyska

samfelagnum og náttúruni. Kunning um serframsýningar, sum eru frammi í løtuni, er á heimasíðuni hjá Listasavni Føroya.

Savnið hevur eitt toymi av rundvísarum, sum kunnu bókast til at vísa runt. Hetta er ein ókeypis tænasta, sum verður boðin heilt frá dagstovnum til hægri lærustovnar í Føroyum. Rundvísingarnar kunnu taka støði í einum ávísum evni, sum verður viðgjørt í undirvísingini, einum ráki, listafólki ella onkrum heilt øðrum. Ein rundvísari hevur ofta eina øðrvísi tilgongd til evnið, og tað kann vera áhugavert hjá bæði lærarum og næmingum at viðgera evnið frá nýggjum sjónarhornum. Lærarar eru eisini vælkomnir at ganga runt við næmingunum sjálvir. Allar føroyskar skúlavitjanir eru ókeypis.

## Um savnið

Tað er viðkomandi hjá stórt sæð øllum lærugreinum á miðnámi at vitja Listasavn Føroya. Um tað so er í føroyskum, fronskum ella fyriskipan, kann ein vitjan á Listasavni Føroya seta undirvísingina í frásjón. Tað er bert hugflogið, sum setur mørk.

Mest umbidna vitjanin á Listasavni Føroya er ein almenn innleiðsla í føroyska list. Tá bóka lærarar ofta ein rundvísara. Rundvísarin byrjar við at bjóða vælkomin, greiðir stutt frá um savnið, og síðani verður farið inn í føstu framsýningina, har flokkurin verður leiddur ígjøgnum tey 12 evnini, og útvald listaverk verða viðgjørd. Ein slík rundvísing tekur umleið 45 minuttir. Við hesi vitjan fáa næmingarnir fyrst og fremst eitt grundleggjandi innlit í føroyska myndlist, umframt at tey hava vitjað tjóðlistasavn Føroya. Á vitjanini síggja næmingarnir fleiri klassikarar í føroyskari list, og bara at hava verið á gátt, er ein uppliving í sjálvum sær.

Myndlist er ofta ein partur av undirvísingartilfarinum í føroyskum, donskum og øðrum mállærugreinum. Næmingarnir skulu duga at greina og tulka eitt listaverk, og tá kann ein rundvísing á Listasavni Føroya leggja afturat undirvísingini. Upplivingin av at síggja eitt listaverk í veruleikanum gevur næminginum eitt innlit og ein eldhuga, sum ikki kann samanberast við at hyggja í eina bók. Til ber at bóka eina rundvísing, sum tekur støði í myndagreining. Eitt annað uppskot er, at lærarin gevur næmingunum uppgávur, sum skulu loysast við støði í einum listaverki á savninum.

## Tín lærugrein á savninum

Skiftandi serframsýningarnar hava aloftast ein samfelagsligan vinkul, sum hóskar væl at brúka í undirvísingini. Eitt dømi er, hvussu lærarar á miðnámi fingu íblástur frá serframsýningini Havið, sum var á savninum heystið 2020 til várið 2021. Í føroyskum hevði ein flokkur lisið stuttsøgur og yrkingar, sum snúgva seg um havið, í samfelagsfrøði hevði ein flokkur havt um havdálking, streym og avleiðingarnar fyri

náttúruna, og á Vinnuháskúlanum komu allir fyrsta árs næmingarnir á gátt at samansjóðast og síggja, hvussu teirra arbeiðsøki varð miðlað í myndlistini.

Møguleikarnir eru mangir. Tað kundi verið upplagt at vitja serframsýningina "Landslagið í broyting" í landafrøði og fingið eitt innlit í náttúruna og okkara samspæl við hana, bæði jaliga og neiliga, ígjøgnum listina, sæð listaverk úr torvi, mold og ull og hugleitt um tilfeingi. Eisini ber til at vitja við samfelagsfrøði og hugleiða um, hvussu menniskjan og umhvørvið verða ávirkað av samfelagsmenning millum annað gjøgnum rák og politiskar avgerðir, millumtjóða og í Føroyum. Eg vil eggja teimum lærarum, sum kundu hugsað sær eina vitjan smíðaða til júst teirra tørv, at práta við savnið um møguleikar og tilboð.

Tær skapandi lærugreinirnar vitja javnan á savninum, alt eftir evni og uppgávu, sum eru á skránni í undirvísingini. Næmingar á klædnaatstøði geva serliga teimum mongu verkunum úr tekstili ans, og samstundis fáa teir íblástur frá hinum listaverkunum. Í myndlist venja næmingar onkuntíð at tekna perspektiv, og aðrar ferðir verður føroysk list sett í samband við altjóða list, sum verður viðgjørd í undirvísingini.

## Samskifti og góðar upplivingar

Mínar royndir sum miðnámsskúlalærari hava gjørt mær greitt, at ein savnsvitjan kann víðka og styrkja læringina hjá næmingum á ein annan hátt enn undirvísing í flokkshølinum kann. Gransking vísir, at læriúrtøkan økist, um næmingarnir sleppa úr flokkshølinum av og á. At flyta undirvísingina frá tí kenda flokkshølinum til tað dynamiska umhvørvið á einum savni er ein uppliving í sjálvum sær.

Á Listasavni Føroya koma næmingarnir í eitt læringsumhvørvi, sum víkir frá tí gerandisliga, við nýggjum íblástrarkeldum og læriháttum. Undirvísingin gerst fjølbroyttari, og lærarin kann sparra við felagar á savninum. Tá næmingarnir hava verið á eini væl eydnaðari vitjan á savninum, gerast tey meira opin fyri mentanarupplivingum. Savnið gerst atkomuligt og viðkomandi fyri næmingarnar, og teir síggja tað sum eina keldu til vitan og uppliving. Næmingar og lærarar uppliva savnið sum eitt stað at ogna sær vitan á jøvnum føti við bøkur, og næmingarnir ogna sær vitan á ein annan hátt. Tilfarið, sum tey hava lisið um og sæð í bókum, gerst ítøkiligt. Næmingarnir kenna listaverkini og listafólkini aftur, gerast forvitin um aðra list og víðka sín mentanarliga sjónarring.

## Kunning

Allar skúlavitjanir eru ókeypis

Til ber at vitja Listasavn Føroya frá kl. 9-16

Bóka eina vitjan við at senda ein teldupost til skular@art.fo ella at ringja 31 35 79

Tað er ókeypis at bóka ein rundvísara til vitjanina

Kunnið tykkum, hvat er á skránni, á heimasíðuni hjá Listasavni Føroya, www.art.fo

# Samstarv í undirvísing og læring

Olav Absalonsen

*Læring er sum eitt torn – tað má byggjast í stigum.*

Lev S. Vygotsky

**Tá ið vit tosa um, hvussu vit samstarva, tá ið vit læra og deila vitan, er viðkomandi at skilja ímillum samstarv sum kooperatión og samstarv sum kollaboratión. Hesi bæði orðini fyri samstarv eru fremmand og ikki vanlig á føroyskum, men eru í hesum sambandi lænt úr eingilskum fyri at skilja ímillum tvey ymisk sløg av samstarvi.**

**Í kooperativum samstarvi verður læring fatað sum tað at taka ímóti vitan og bera hana víðari, men í kollaborativum samstarvi verður læring fatað sum tað, at vit í felag finna ella skapa nýggja vitan. Tískil er kollaboratión vanliga læring á hægri stigi enn kooperatión. Henda grein kann lesast sum framhald av greinini *Læring millum javnlíkar* í Miðnámsriti 23.**

## Kooperativt ella kollaborativt samstarv

Í kooperativum arbeiði verða arbeiðsuppgávurnar býttar út millum tey, sum gera arbeiðið, har hvør einstakur hevur ábyrgd av tí, sum hann skal gera. Í kollaboratión eru luttakararnir við í einum samskipaðum arbeiði til at loysa uppgávuna í felag. Munurin liggur í, hvussu uppgávan er býtt. Í kooperativum samstarvi verður uppgávan býtt sundur í smærri uppgávur, sum eru leysar av hvørji aðrari. Í kollaborativum arbeiði eru tær tvinnaðar saman í eina.

Tá ið samstarvið er kooperativt, er ikki neyðugt hjá luttakarunum at vita, hvat hini takast við. Tá ið øll eru liðug við tað, sum tey skuldu gera, er heildaruppgávan loyst. Hetta krevur, at arbeiðsuppgávurnar verða samskipaðar. Tí er neyðugt, at øll ábyrgdarøkini eru væl lýst.

Kollaboratión er hinvegin eitt samstarv, har luttakararnir hava eina felags arbeiðsuppgávu at loysa. Øll eru bundin til at arbeiða saman – og ikki í sjálvdrátti. Øll eru við í einum felagsskapi, og øll vita tað sama. Tey hava eina felags fatan av arbeiðsuppgávuni og felags ábyrgd. Tí krevst, at samskiftið í felagsskapinum virkar, og at arbeiðið verður samskipað so hvørt.

Í arbeiðslívinum finna vit bæði kooperativt samstarv og kollaborativt. Áðrenn hópframleiðsla til goymslu bleiv vanlig, gjørdu handverkarar vørur eftir bílegging. Men við ídnaðarkollveltingini bleiv arbeiðsbýtið meira kooperativt við taylorismuni[1] og fordismuni[2]. Tann einstaki arbeiðsmaðurin, sum ger ein lítlan part av heildini, hevur ikki fyri neyðini at vita, hvussu lidna vøran sær út. Leiðslan leggur arbeiðsgongdina til rættis. Men ikki alt arbeiði kann skipast eftir taylorismuni. Stovnar sum sjúkhús og skúlar krevja eitt annað slag av samstarvi millum fólk við ymiskum førleikum. Her krevst kollaboratión.

Vit kunnu samanbera hetta við liðítrótt. Ein stafettkapping í renning ella svimjing líkist hópframleiðslu, har hvør einstakur kýtir seg einsamallur fyri liðið. Men sjúkhús og skúlar – og eisini ymisk sløg av framleiðslu – minna meira um fótbólt og hondbólt, har hvør einstakur skal duga at lesa spælið og taka avgerðir eftir, hvat onnur á liðinum gera.

Bæði kooperatión og kollaboratión eru sostatt viðkomandi í arbeiðslívinum. Tað er slagið av arbeiði, ið ger av, hvat slag av samstarvi er betur egnað. Eisini skal havast í huga, at tað er ikki antin ella, men eitt samfelt samband ímillum kooperatión og kollaboratión. Ein vitanartung framleiðsla hevur størri tørv á kollaborativum samstarvi. Snýr tað seg um at læra – í arbeiði ella skúla – tosa vit um at menna vitan, og tá skal samstarv við onnur vera eftir kollaborativum treytum.

Kooperativ vitanardeiling er sostatt, at ein gevur øðrum vitan, og tekur ímóti vitan frá øðrum. Og kollaborativ vitanardeiling er, at ein í samstarvinum við onnur tekur tey við í hugsanir, hugskot og ætlanir, meðan arbeitt verður. Kooperatión og kollaboratión eru tískil ikki reinir formar fyri samstarv. Í staðin kann samstarvið vera meiri og minni kooperativt ella kollaborativt. Vit kunnu síggja hetta sum eina samfelda gongd frá at arbeiða sjálvstøðugt umvegis kooperativt samstarv til at samstarva kollaborativt.

## Kooperativ og kollaborativ læring

Í eingilskmæltum londum, serliga í Norður-Amerika, eru kooperativ læring og kollaborativ læring kend hugtøk frá undirvísing í verki. Lærarin hevur stóran leiklut í kooperativari læring, sum verður lítið brúkt á hægri námi. Kooperativ læring er sprottin úr kognitivari menningarsálarfrøði. Undirvísingin byggir á, at lærarin er myndugleiki og serfrøðingur; og dentur verður lagdur á at náa ávís læringsmál.

---

[1] Scientific Management: framleiðsluháttur við denti á at býta framleiðslugongdina sundur í nøgv smá stig fyri at økja um produktivitetin, uppkallaður eftir Frederick Taylor.

[2] Framleiðsluháttur við samlibandi, uppkallaður eftir Henry Ford.

Lærarin stýrir og setir mál, og hann metir um, hvussu gongur. Virksemið er skipað soleiðis, at javnvág er ímillum at læra at arbeiða saman og at ogna sær førleika og vitan.

Kollaborativ læring verður meira brúkt í hægri útbúgvingum. Spurningar eru ofta opnir, og dentur er á, at tey lærandi arbeiða saman at loysa teir. Lærarar áseta karmar um virksemið, men hvussu tey lærandi arbeiða saman, gera tey sjálv av. Størri dentur er á læring enn á útbúgving. Lærarin er fasilitator, ið tosar við tey lærandi um læring og eftirmeting. Innihaldið í kollaborativari læring er til dømis: at hugsa kritiskt, loysa vandamál, taka støðu til hvat gevur meining, at mennast persónliga, at skapa vitan sosialt, granska og kjakast. Hetta er treytað av, at vaksin fólk hava meiri royndir sosialt og eru helst meira beinleiðis motiverað, soleiðis at tey eru før fyri at vera við í kollaborativari læring. At duga at vera ósamd og seta spurnartekin við tað, sum onnur halda, er ein neyðugur partur av kollaborativari læring.

Um miðnám skal byggja brúgv millum grundnám og hægri nám, er uppgávan at fáa næmingarnar at menna samstarv frá kooperativari læring til kollaborativa læring, har fakmørkini ikki eru knívskorin, spurningarnir meira opnir, og svarini ikki altíð røtt ella skeiv.

## Teoriir um læring

Nógvar teoriir eru um læring. Í høvuðsheitum kunnu vit tosa um behaviorismu, kognitivismu og konstruktivismu. Flestu teoriir eru frábrigdi av hesum trimum. Behaviorisma leggur, sum orðið sigur, dent á at fáa næmingar at hava ávísa atferð. Endamálið við undirvísingini er, at læringin skal síggjast. SOR-myndilin (stimulus, organism, response) er galdandi her: Lærarin stýrir næminginum ein ávísan veg. Undirvísingin er tí merkt av at løna ella rósa næminginum, tá ið hann ger okkurt rætt, og revsa hann, tá ið hann ger okkurt skeivt. Eisini kann hon vera merkt av at fáa næmingin at avrika, soleiðis at avrikini blíva betri. Undirvísingin er merkt av venjingum og óbeinleiðis motivatión.

Kognitivisma fer longri enn behaviorisma og sær ikki tey lærandi sum óskrivað bløð, men sum einstaklingar við egnum hugsanum, royndum og egnari vitan; og tað skal undirvísingin byggja á til at møta tí einstaka, sum hann er. Meðan behaviorisma sær læraran sum serfrøðing, ið ber vitan víðari til óvitandi næmingar, sær kognitivisma læraran sum ein, ið leiðbeinir og byggir brúgv ímillum tað, sum tann lærandi veit, og tað, sum hann skal læra. Lærarin stuðlar næmingunum at søkja nýggja vitan og førleikar, sum teir kunnu brúka at laga teirra fatan og hugsan eftir. Kognitivisma er eisini eitt mótmæli ímóti behaviorismu, ið einans sær læring sum tað, at næmingurin

fær ávísa atferð, og gloymir, at tey lærandi eisini kunnu hugsa sjálv, viðgera, meta um og skapa vitan. Og læring kann tískil eisini vera ósjónlig. Jørgen Bang og Christian Dalsgaard seta kognitivismu í samband við kooperativa læring, hóast kognitivisma ikki er treytað av samstarvi. Teir vísa á, at kooperativt samstarv kann styrkja kognitiva læring, soleiðis at vitan verður móttikin, viðgjørd, organiserað, goymd og deild.

Konstruktivisma byggir á kognitivismu, men hevur nøkur eyðkenni, ið bróta frá. Kognitivisma byggir á logiska hugsan, har kenslur ikki hava nakran týdning. Men konstruktivisma samansjóðar logiskan og humanistiskan hugsanarhátt, har tann einstaki sjálvur tulkar informatión frá øðrum, og har fólk læra saman, meðan tey eygleiða, hvussu onnur bera seg at. Sosial konstruktivisma er eitt frábrigdi við denti á sosiala samvirkan og mentan, tá ið vitan verður til. Sambært hesum er vitan ein sosial konstruktión. Tí fer læring fram í sosialum samanhangi, og vitanin er bundin at sosialum samanhangi. Jørgen Bang og Christian Dalsgaard seta kollaborativa læring í samband við sosiala konstruktivismu, har tey lærandi í felag byggja nakað upp.

## Kooperativ og kollaborativ undirvísing

Sundurbýtingin millum kooperativa og kollaborativa læring elvir til at miða eftir kollaborativum samstarvi í undirvísing og læring. Men hetta ynski setir krøv til, hvussu skúlaverkið er skipað. Verandi skúlaskipan á miðnámi stuðlar upp undir kognitivismu og kooperativa læring. Lærarar á bæði gymnasialum og yrkisligum miðnámi eru fakligir serfrøðingar, og námsætlanir í hvørjum faki áseta, hvat næmingarnir skulu vita og duga í viðkomandi faki. Henda skipan leggur upp til at bera vitan víðari til næmingar, sum skulu viðgera, goyma og deila hesa vitan. Kollaborativt samstarv setir onnur og øðrvísi krøv til, hvussu vit skipa samstarv millum lærarar á miðnámi.

Hugskotið um konstruktivismu og kollaborativa læring skuldi helst fingið lærarar, sum hava sama skúlaflokk, at arbeitt saman kollaborativt, soleiðis at læringin ikki bara verður bygd upp í hvørjari lærugrein, men at hon eisini byggir brýr ímillum lærugreinir. Tí læring snýr seg ikki bara um at goyma vitan og duga at endurgeva, men eisini at duga at viðgera vitan og brúka hana í einum dynamiskum samanhangi tvørtur um fakmørkini, sum eru ásett í útbúgvingarkunngerðum.

Jørgen Bang og Christian Dalsgaard vísa á royndir í einum fólkaskúla, har lærarar brúktu felags loggbøkur, sum allir lærarar í toyminum skrivaðu í so hvørt, soleiðis at teir í felag skaptu eitt samstarv um undirvísing. Henda verkætlanin vísti, at tað at deila vitan ikki bara eigur at vera at deila lidnar undirvísingargongdir, men at tað er at deila hana konstruktivt við samskifti og samstarvi millum lærarar. Hetta krevur

arbeiðsgongdir, har lærarar ikki bara brúka amboð frá hvørjum øðrum (hugskot, hugsanir, tilfar, uppgávur, royndir og annað), men eisini meta um hugskot hjá hinum og kjakast um hesi amboð.

Í verki kunnu vit tosa um, at samstarvið millum lærarar kann vera fakligt, og lærarar í sama faki skapa eitt kollaborativt samstarv; tá er tað sjálvt fakið, ið samstarvið snýr seg um. Men vit kunnu eisini tosa um tvørfakligt samstarv millum lærarar, sum hava sama flokk; og tá snýr samstarvið seg um næmingarnar í flokkinum. Tað seinna samstarvið millum lærarar hevur tvørfakliga læring sum mál, men eisini kollaborativt samstarv millum næmingar í flokkinum. Á miðnámi skulu vit byggja brúgv millum fólkaskúla og víðari útbúgving, og tí er alneyðugt, at samstarvið millum næmingar á miðnámi verður minni kooperativt og meiri kollaborativt.

## Keldur


David Boud. *Peer learning in higher education: learning from & with each other*. Kogan Page 2001.

Diana Skoradal. Relatiónir millum lærara og næming. *Miðnámsrit 23*, 2021.

Jógvan Fríðriksson. Skerdur fuglur vitjar sjáldan høgar hæddir. *Miðnámsrit 18*, 2020.

Jørgen Bang og Christian Dalsgaard. Samarbejde – kooperation eller kollaboration? *Tidsskrift for universiteternes efter- og videreuddannelse*, nr. 5, 2005.

Leif Strandberg. *Vygotskij í verki*. Forlagið Ítriv 2013. Týdd úr svenskum: *Vygotskij i praktiken*. Norsteds Akademiska Förlag 2006.

Mortan Ó. Vang. "Kenn tína ávirkan" – um sjónliga læring og John Hattie. *Miðnámsrit 11*, 2016.

Olav Absalonsen. At læra fakliga og tvørfakliga. *Miðnámsrit 16*, 2018.

Olav Absalonsen. Læring millum javnlíkar. *Miðnámsrit 23*, 2021.

Paula Gaard. Tann vakri váðin í útbúgving. *Miðnámsrit 10*, 2016.

Paula Gaard. Kreativitetur í undirvísing. *Miðnámsrit 23*, 2021.

Tina Rasmussen. Samstarv millum næmingar fremur læring. *Miðnámsrit 21*, 2021.

# Næmingar á miðnámi sakna føroyskt lærutilfar

Tórður Johannesarson

**Í januar í 2022 spurdi eg næmingaráðini á miðnámi: 1) hvørjir fyrimunir og hvørjir vansar eru at brúka danskt/eingilskt lærutilfar, og 2) hvørjir fyrimunir og hvørjir vansar eru at brúka føroyskt lærutilfar.**

## Fyrimunir at brúka útlendskt tilfar

Eitt av næmingaráðunum vísir á, at tað er ein fyrimunur at brúka útlendskar lærubøkur, tí á tann hátt læra tey hugtøk, sum tey kunnu brúka, um tey fara at lesa á hægri lærustovni, hetta ger seg serliga galdandi í náttúrulærugreinum. Tey vísa á, at tað verður lættari at fylgja við í undirvísingini, um man velur at lesa uttanlands. Um ein hevur nýtt føroyskt lærutilfar allan fólkaskúlan og á miðnámi, og kemur til Danmarkar at lesa víðari, kann tað verða trupult at fylgja við og at skilja øll tey donsku ella eingilsku heitini, ið verða brúkt. Tí er tað gott, at tey hava lært at brúka hugtøk og heiti á donskum ella eingilskum, so tey ikki koma at vera aftan fyri hini.

## Vansar at brúka danskt/enskt tilfar

Vansin við donskum lærubókum er, at tað kann vera torført hjá summum næmingum (serliga tilflytarum) at skilja málið. Vansin við eingilskum lærubókum er, at flestu føroyskir næmingar skilja betur føroyskt enn eingilskt. Eisini tíma tey flestu betur at lesa føroyskt. Ein annar vansi er, tá ið lærubøkurnar t.d. eru á donskum, har hugtøk og heiti eru á donskum, at lærarin brúkar føroysk heiti. Hetta kann vera sera ørkymlandi. Hetta kemur t.d. til sjóndar, tá ið næmingar skulu til roynd, tá kenna teir ikki tey føroysku orðini, tí at teir hava vant seg við útlendsku orðini. Ein annar vansi er, at tey flestu, sum ganga á miðnámi, hava brúkt føroyskt lærutilfar í fólkaskúlanum. Tá ið tey so koma á miðnám, kann tað vera torført at læra øll heitini á einum øðrum máli, og tað kann verða torført og órógvandi viðhvørt at skilja eina uppgávu, um man alla tíðina er noydd/ur at umseta eindir og heiti, ímeðan man roynir at loysa uppgávuna. Tey koma í trupulleikar, tá ið stórar uppgávur skulu skrivast, tí uppgávan skal skrivast á føroyskum, men tey hava havt danskar bøkur, og tað er ikki altíð lætt at finna tey føroysku heitini. Hetta er serliga í náttúruvísindi. Tað kann sum heild vera avbjóðandi, tá ið tekstirnir eru langir í eitt nú søgu og samfelagsfrøði. Fleiri skilja illa enskt og danskt.

## Fyrimunir at brúka føroyskt tilfar

Fyrimunurin er, at flestu føroyskir næmingar tíma betur at lesa føroyskt enn fremmandamál. Tað er nógv lættari at skilja føroyskan tekst, tí hann er á móðurmálinum. Ein annar fyrimunur er, at teir duga betur at orða seg, tá ið uppgávur skulu skrivast, tí at samanhangur er millum undirvísing og uppgávuskriving. Í fólkaskúlanum verður dentur lagdur á, at næmingar læra at brúka tey røttu føroysku orðini, eisini í náttúruvísindi, og hetta sama átti at verið gjørt í miðnámsskúlunum. Føroyskt tilfar er sera gott, tí tað er lættari at skilja, og tað er ikki neyðugt at brúka tíð til at umseta orð, ein ikki skilir. Í føroyska tilfarinum verða føroysk orð og fyribrigdi lýst við føroyskum dømum.

## Vansar at brúka føroyskt tilfar

Tað er bert eitt av næmingaráðunum, ið vísir á, at vansin við føroyskum lærubókum er, at donsk og altjóða hugtøk ikki verða nýtt, serliga í náttúrulærugreinum.

## Hvat kann sigast um svarini?

Svarini frá næmingaráðunum koma neyvan óvart á okkum lærarar. Vit vita væl, at tað á ongan hátt er ein fyrimunur námsfrøðiliga at undirvísa á einum máli, meðan lærutilfarið er á øðrum máli. Hetta órógvar og ørkymlar næmingin og ger, at evnið virkar fremmant fyri hann. Eitt av næmingaráðunum skrivar, at tað ein vansi hjá útlendingum at lesa danskt lærutilfar, men føroyskt og eingilskt er eingin trupulleiki. Eitt annað næmingaráð vísir á, at tey eru von við at brúka føroyskt lærutilfar í fólkaskúlanum, men tá ið tey koma á miðnám, skulu tey næstan avlærast. Í løtuni er einki samsvar millum fólkaskúla og miðnám. Næstan øll næmingaráðini nevna, at tað er ein fyrimunur at brúka útlendskt lærutilfar, tá ið man skal lesa á hægri lærustovni. Í veruleikanum er hetta ein mýta. Eg havi ongantíð hoyrt føroyingar gramt seg um, at tað er so strævið at venja seg við útlendsk fakheiti, meðan teir ganga á hægri lærustovni. Tá ið tú ert sloppin inn á dreymaútbúgvingina, ert tú somikið motiveraður, at tað er líkamikið, um tað á donskum eitur tríkantur, á føroyskum tríhyrningur og á enskum triangle. Øll hesi fakheiti festa seg somikið skjótt, tí at útbúgvingin hugtekur og dregur. Tú veitst av, at tú ert noydd/ur at læra teg hesi heiti, um tú ætlar at gera útbúgvingina lidna og brúka útbúgvingina í verki.

Tá ið næmingar gremja seg um føroysk fakorð, ið ikki eru tey somu á donskum og eingilskum, kundi verið áhugavert at nevnt, at á miðnámi brúka vit nógv fremmandaorð í lærugreinunum, hóast undirvísingarmálið er føroyskt, og er hetta

helst neyðugt. Tað føroyska tilfarið skal verja føroyskt orðalag og setningsbygnað/syntaks. Á miðnámi er eisini siður, at eingilsk terminologi er partur av læringini í fakinum. Um vit t.d. hyggja í onkra bók í støddfrøði, sum verður brúkt í fólkaskúlanum, verða orð sum kvadrat, rektangul, parallellogram, romba og trapets brúkt. Tað vil siga, at nú er man farin frá serføroyskum orðum sum rætthyrningur, ferningur og javnfirringur. Sum heild vísa svarini frá næmingaráðunum, at føroyskir miðnámsskúlanæmingar ynskja føroyskt lærutilfar.

# Er metodufrælsið hótt?

Jón í Haraldsstovu

**Hvør ger av, hvørji evni verða tikin fram í undirvísingini, og hvussu tey verða viðgjørd? Vanliga verður hildið, at námsætlanin setir karmarnar fyri, hvørji evni skulu røkkast í einstøku lærugreinini. Innan fyri hesar karmar skipa vit sum lærarar undirvísingina, halda vit.**

## Upplýsing og trúgv

Summi evni eru ella hava verið meira viðkvom at viðgera enn onnur. Fyri ikki so nógvum árum síðani var "kreationisma" eitt evni, sum var frammi. Spurningurin um skapan kontra evolutións-ástøði, og í hvønn mun ein skapari stóð aftanfyri náttúruna, var tá stríðsmálið. Um bæði sjónarmið skulu lýsast heilt stutt, so er annað sjónarmiðið, at heimurin er vorðin til við einum bresti, og síðani er ein evolutión farin fram, har tær verurnar, sum tillaga seg best, yvirliva, meðan aðrar doyggja út. Evolutións-ástøðið hjá Darwin man verða tað ástøðið, sum í hesum samanhanginum hevur staðið sína roynd. Hitt sjónarmiðið er, at ein skapari stendur aftan fyri menningina. Summir næmingar eru trúgvandi og kunnu illa góðtaka sjónarmiðið um, at heimurin er vorðin til í einari tilgongd, har verur laga seg eftir umstøðunum, og kanska serliga, at menniskjan eisini er eitt úrslit av hesari menning. Teirra grundsjónarmið ella lívsáskoðan er, at ein skapari er aftan fyri heimin. Allíkavæl haldi eg ikki, at lærarar kenna seg trýstar ella ávirkaðar í sínari undirvísing, evolutións-ástøðið er ein fastur partur av undirvísingini í m.a. lívfrøði. So vítt eg veit, er ikki stórvegis stríð um henda spurning í dagligari undirvísing. Onkursvegna hevur tað eydnast at skilja vísindaliga fatan og trúgv sundur.

Eg giti, at øll eru samd um, at í lívfrøði og í øðrum lærugreinum skal undirvísast í menningarlæruni, og at nátturuvísindaligur arbeiðsháttur skal lærast og brúkast í undirvísingini.

## Mentanarligir samanbrestir

Um vit flyta okkum yvir til samfelagsligu lærugreinirnar, so eru evni, sum eisini hava skapt og enn skapa stríð. Í 2005 kom Danmark og serliga danska blaðið Jyllands-Posten á allar tíðindapallar runt heimin. Stríðið snúði seg um tekningar av profetinum Muhammed, sum blaðið prentaði tann 30. september 2005. Málið byrjaði við einari ætlan um at gera eina barnabók um lívið hjá Muhammed. Men teknarin vildi ikki leggja navn til tekningarnar í bókini, tí hann óttaðist avleiðingarnar fyri seg og

familjuna, um tað kom fram, hvør hevði teknað. Jyllands-Posten loftaði avbjóðingini um vantandi talu- og skrivifrælsi og vildi kanna pástandin, um mann kundi tekna profetin. Felagið Danskir Blaðteknarar vórðu bodnir at senda tekningar inn av Muhammed, "soleiðis sum teir sóu hann". Í blaðið komu 12 tekningar, og mentanarblaðstjórin Flemming Rose greiddi frá hóttanini móti mentanarlívinum og tað ósambærliga við sensur og fólkaræði, um man ikki tordi at geva hesar tekningar út. Vikur seinni brast á við mótmælum, fyrst í danska islamska umhvørvinum og seinni um allan islamska heimin.

Avleiðingarnar av Muhammed-kreppuni síggjast enn. Fyri stuttum setti ein franskur miðnámslærari sær fyri at vísa Muhammed-tekningarnar í lærugreinini samfelagsfrøði í evninum talufrælsi og blasfemi. Lærarin, Samuel Paty, gjørdi næmingarnar varugar við, at hann ætlaði at vísa tekningarnar í undirvísingini. Vanliga, tá viðkvom evni vórðu tikin upp í undirvísingini, ávaraði Paty næmingarnar og segði við teir, at teir kundu lata eyguni aftur, um teir ikki vildu síggja tekningarnar. Ein genta, sum ikki hevði verið í klassanum[3], segði pápa sínum frá um tekningarnar. Hann sendi so eina kæru til skúlan og jagstraði Paty á sosialu miðlunum. Uppøstur av kjakinum á sosialu miðlunum leyp ein 18 ára gamal tjetjeni á Paty og avhøvdaði hann.

Á Batley Grammar School í Batley stutt frá Bradford í Onglandi, vórðu ein lærari og starvsfólk 1. apríl 2021 loyst úr starvi eina tíð. Lærarin, sum undirvísti í evninum blasfemi í religión, vísti næmingunum eina mynd av Muhammed úr satiriska blaðnum Charlie Hebdo. Ein stórur partur av næmingunum á skúlanum eru muslimar av suður-asiatiskum etniskum uppruna. Foreldur mótmæltu, stuðlað av mentanarligum og átrúnaðarligum feløgum, at tilfarið varð brúkt í undirvísingini. Skúlaleiðslan lat seg trýsta og suspenderaði læraran. Hóast Ongland strikaði blasfemi-lógirnar í 2008, so feldu Muhammed-tekningarnar enn ein lærara.

Ein mannarættindasakførari sigur í greinini um stríðið á Batley Grammar School, at tvey perspektiv eru frammi her. Annað er rættindini hjá muslimsku foreldrunum, sum vóru ill og tóku sær nær, at mann hevði víst tekningar av Muhammed fyri børnum teirra, og kendu seg særd av, at tey høvdu sæð tekningarnar. Hitt er progressiva sjónarmiðið um, at í einum samfelag, sum er multi-kulturelt og við stórum ymiskleika, mugu spurningar um religión viðgerast eins og aðrir spurningar. Leiðslan í skúlanum

---

[3] Gentan hevði sagt við pápa sín, at Paty bað næmingar, sum ikki vildu síggja tekningarnar, fara út. Men hon skulkaði henda dagin. So hon sá ikki tekningarnar sjálv, men hoyrdi um tær frá øðrum næmingum.

studlaði tó ikki rættinum hjá lærarunum at undirvísa og brúka tað tilfar, sum lærarin metti vera hóskandi í hesum evni.

Í kjalarvørrinum av hendingunum í Fraklandi og morðinum á Paty gjørdi blaðið Informatión eina spurnakanning millum søgu- og samfelagslærarar í danska fólkaskúlanum. Í kanningini kom fram, at 34 prosent av lærarunum óttaðust at taka Muhammed-tekningarnar fram í undirvísingini. Í aðrari kanning, sum DR gjørdi millum miðnámslærarar, vóru einans 16 prosent av lærarunum, sum søgdu seg ikki tora at taka tekningarnar fram í undirvísingini. Funnist varð at kanningini, sum ikki varð mett at vera eftirfarandi, tí einans 227 lærarar høvdu svarað.

Tíbetur hava vit, sum undirvísa í Føroyum, ikki somu avbjóðingar av blasfemi og framsøgufrælsi í undirvísingini. Føroyskir lærarar aftra seg ikki við at taka Muhammed-tekningarnar fram í undirvísingini, giti eg.

## Samanbrestir millum ættarlið

Uppreistur ímóti skúlaskipanini og samfelagnum annars er ikki nakað nýtt. Serliga seinna partin av 1960'unum settu ungdómar runt í Evropa og USA seg upp ímóti undirvísingarskipanum og samfelagnum annars og royndu at gera vart við sína ónøgd við avoldaðu undirvísingarskipanina – eftir teirra meining. Kanska kann tað stríðið lýsast sum eina uppgerð við stirvnar konservativar normar og virði hjá eldra ættarliðinum, har studentarnir vildu hava eitt meira frílynt samfelag, har tey sjálv kundu gera av, hvørjir normar og hvørji virði skuldu vera galdandi. Uppreistrarhugurin rakk eisini til Føroya, har m.a. stríðið um føroyskt ella danskt sum undirvísingar- og próvtøkumál á miðnámi var frammi. Hetta stríðið var kanska líka nógv eitt tjóðskaparstríð, men at studentar settu seg upp ímóti skipanini, kann tulkast sum avleiðing av uppreistrarrákinum úti í heimi.

Seinastu árini hava næmingar á amerikanskum high schools og colleges funnist at námsætlanum og tilfari, sum lærarar hava brúkt í undirvísingini. Um 2013 komu fram hendingar, har næmingar vístu á "triggering"-tilfar, sum teir hildu skuldi takast av pensum. Orðið "triggering" merkir, at bøkur, tekstir og tilfar annars kunnu skapa ótrygd og gera, at tey kenna seg hótt ella ósikkur.

Nakrir næmingar á Columbia University skrivaðu í næmingablaðnum á skúlanum, at næmingar mugu kenna seg tryggar í skúlastovuni, men fleiri tekstir vóru fullir av søgum og frásøgnum um at útihýsa og kúga og øðrum ágangandi og ódámligum tilfari, sum niðurgjørdi samleikan hjá summum næmingum í flokkinum.

Í greinini førdu næmingarnir fram, at lærarin átti at havt at ávarað ("triggerwarning") næmingarnar skrivliga um, at tilfarið kundi vera skelkandi. Eisini gjørdist meira

vanligt, at framsøgufólk, sum leiðslan hevði boðið at hava framløgur á universitetum, vórðu boykottað av næmingunum, tí tey høvdu sjónarmið, sum næmingum ikki dámdi.

Mótmæli og boykott hoyra bæði ungdómi og universitetum til, og eru jú ein partur av teimum amboðum, sum kunnu brúkast til at gera upp við ella seta seg upp í móti sjónarmiðum, mann ikki tekur undir við.

Roynt varð á universitetum at seta reglur í gildi fyri sokallaðar “speechcodes”, sum settu mark fyri, hvussu ógvuslig orð mann kundi brúka, orð, sum vóru mett at vera rasistisk ella sexistisk. Men hóast reglurnar og avlýsingar av talarum og framsøgufólkum hildu mótmælini fram.

Tann stóra broytingin, sambært Lukonoff og Haidt, er, at næmingar nú siga seg verða hóttar av orðum og talu, sum hevur við sær, at tey missa førleikar og kenna seg ótrygg. Fyri at tey kunnu kenna seg trygg, skulu lærarar ávara tey um ágangandi tilfar í pensum, soleiðis at skúlin verður eitt trygt umhvørvi fyri tey. Broytingin, sum er farin fram millum tey ungu, er sambært høvundunum sera óheppin, tí ein mentan (ungdómsmentan) ella sannføring, har tryggleiki verður raðfestur og hevur størsta týdning, skapar ein ungdóm, sum er viðkvæmur og ikki klárar at standa ímóti teimum avbjóðingunum, sum tey møta seinni í lívinum.

Men hvat hevur ein ótryggur og viðkvæmur amerikanskur ungdómur við okkum í Føroyum at gera? Sum evropearar og norðbúgvar hava vit vanliga eitt kritiskt eyga vent ímóti tí, sum hendir hinumegin Atlantshavið, og sum heild má man bara rista við høvdinum um tað, sum hendir har.

Á heysti 2021 høvdu vit á Glasi trivnaðardag um rúsevni og misnýtslu, og høvdu vit valt at vísa ein íslendskan film “Lat meg falla”. Vit vóru nøkur, sum høvdu sæð filmin í Norðurlandahúsinum, og hann rørdi okkum djúpt. Skjótt kunnu vit verða samd um, at tá mann skipar fyri einum trivnaðardegi, so liggur oftast í kortinum, at tað skal vera hugnaligt, so næmingarnar kunnu sosialiserast og hava ein hugnaligan dag. Vit kunnu eisini verða samd um, at hetta varð ikki ein tílíkur dagur. Eg haldi sjálvur, at dagurin var væl eydnaður út frá einum læringssjónarhorni, har næmingarnir fóru til hús við onkrum at hugsa um. Eingin ivi er um, at filmurin varð ógvusligur. Vit høvdu kannað aldursmarkið, sum var 15 ár. Sagt var eisini frá, áðrenn filmurin byrjaði, at hann var ógvusligur – ikki minni enn tvær ferðir.

Tá filmurin var liðugur, og pallborðsfundur skuldi verða um rúsevnismisnýtslu, tók ein næmingur orðið og spurdi, hví vit ikki høvdu givið eina “triggerwarning” um, at filmurin var so ógvusligur. Hetta var orðið, ið varð brúkt. Tað vil siga, at orðið, sum

varð brúkt millum næmingar á lærustovnum í USA, eisini hevði fest seg millum næmingar í Føroyum – sjálvandi.

Sum Lukianoff og Haidt vísa á, so siga næmingar seg gerast illa fyri kroppsliga av at lesa tekstir ella hoyra talu, sum skelkar ella stoytir teir; tey kenna seg ikki trygg. Eitt dømi um hesa kenslu kom fram herfyri á einum skúla í Føroyum. Ein lærari hevði biðið næmingarnar lata stílar inn, har eitt viðkvæmt samfelagsevni skuldi viðgerast. Evni, ið verða viðgjørd í hugvísindum og samfelagsvísindum kunnu vera viðkvom, men tey eru týdningarmikil og neyðug at viðgera. Lærarin fær tá at vita frá einum næmingi, at ikki bar til hjá sær at lata stíl inn í hesum evninum, tí tað ávirkaði sálarheilsuna at viðgera slíkt evni.

Sjálvandi kunnu persónligar orsakir vera til, at ein næmingur ikki kann ella ikki megnar at viðgera viðkvom evni, og tað er í so máta ikki ein trupulleiki. Næmingurin kann lata vera við at lata inn, ella spyrja læraran, um hann kann skriva um okkurt annað evni. Men er hetta dømi um ta gongd, sum Lukianoff og Haidt gera vart við?

Tað er vorðið meira vanligt, at vit sum lærarar lata okkum ávirka av, at næmingar eru viðkvæmir, tá vit skulu brúka og viðgera evni og tilfar í undirvísingini. Ein starvsfelagi skuldi í religión viðgera "sóldansin", sum var eitt "rite de passage" ritual hjá norðuramerikansku indianarum. Í ritualinum verða tvey hol skorin gjøgnum húðina í bringuni á tí manni, sum skal ígjøgnum ritualið. Ein pinnur verður stungin ígjøgnum hvørt hol og band bundið um, og síðani verður maðurin hálaður upp, so hann hongur leysur. Sjáldan sæst hetta á filmi, men ein western-filmur "A Man Called Horse" frá 1970 við Richard Harris í høvuðsleiklutinum, vísir hetta ritualið. Lærarin velur at brúka brotið úr filmunum, fyri at næmingarnir skulu skilja, hvat hendir undir sóldansinum. Í lýsingini av filmsbrotinum, sum lærarin leggur út, velur hann at ávara næmingarnar. Lærarin skrivar til næmingarnar, at brotið vísir ógvusligar myndir, og at teir næmingar, sum ikki klára at síggja sovorðið, kunnu lata eyguni aftur ta løtuna, brotið verður víst. Forrestin tað sama, sum Paty segði við sínari næmingar.

Hetta, sum lýst er omanfyri, er dømi um "triggerwarning". Vit eru eisini ávirkað av tí ímyndaðu sálarligu støðuni, sum vit halda, at summir næmingar eru í. Vit royna at skapa eitt frírúm, tí vit kenna á okkum, at í næmingahópinum eru næmingar, sum møguliga kenna seg ótryggar og viðkvæmar, og royna vit tí at verja teir við at lata teir sleppa undan tí, sum er teimum ovboðið.

Eisini er komið fyri, at stovnur uttan fyri skúlan er komin við "triggerwarning". Skúlin hevur fingið áheitan frá stovni um ikki at viðgera ávís viðbrekin evni, tí tað kann skaða sálarheilsuna hjá summum næmingum. Henda áheitanin um at skapa eitt frírúm fyri

viðbreknar næmingar, vísir, at uttan fyri skúlan er tann fatan, at summir av okkara næmingum eru so viðbreknir, at teir ikki eru førir fyri at viðgera viðkvom evni. Tað vil siga, at henda sálarliga ella mentala støðan, sum fyrr nevndu høvundar hava eygleitt millum næmingar á amerikanskum lærustovnum, og hvørjar avleiðingarnar eru, allarhelst eisini er at síggja hjá okkum.

Um vit venda aftur til Lukianoff og Haidt, so vísa teir á, at hetta rákið, sum er íkomið, ikki er gott fyri samfelagið, og serliga ikki fyri tey ungu. Umframt at verða boðin av fakliga og sosialt í skúlanum verða tey ungu í dag útsett fyri ágangi, plágum, háðanum og kapping av øllum slag á sosialu miðlunum. Tí nyttar tað einki, sambært høvundunum, at foreldur og stovnar, sum eru um tey ungu, balla tey inn og verja tey ímóti avbjóðingum. Heldur eiga stovnar og foreldur at stimbra næmingarnar, so teir kunna standa ímóti teimum avbjóðingum, sum tey við vissu fara at renna seg í og stríðast við gjøgnum lívið.

Sum lærarar hava vit metodufrælsi innan fyri karmarnar í námsætlanum, har vit gera av, hvussu vit undirvísa og í hvørjum, og mugu vit verja hetta frælsið, sum er undir trýsti av mentanarligum og hugsjónarligum samanbrestum og frá stovnum, sum meta, at ikki allir næmingar eru mentalt førir fyri at viðgera harðskap, misnýtslu, sjálvmorð, vanlukkur og onnur óhugnalig evni, sum eru verulig í samfelagnum.

## Keldur

Bók:

Lukianoff,Greg/Haidt,Jonathan:(2018) “ The coddling of the American Mind”. How good intentions and bad ideas are setting up a generation for failure. Penguin Press.

Grein:

jyllands-posten.org/skoleelever/muhammed.php

Heimasíður:

https://gymnasieskolen.dk/laerere-drabet-i-frankrig-maa-ikke-aendre-vores-undervisning

https://humanists.uk/campaigns/successful-campaigns/abolition-of-blasphemy-laws/

https://www.bbc.com/news/world-europe-56325254

https://www.bbc.com/news/uk-england-leeds-56590417

# Miðnámsskúlaútbúgvingin má endurskoðast

Birna Heinesen

**Birna Heinesen varð forkvinna í YF í februar 2022. Frá barnsbeini hevur hon havt áhuga í fakfelagsarbeiði. Pápi hennara arbeiddi í einum fakfelag, og hon var hugtikin av, hvussu sterkt og meiningsfult eitt fakfelag virkar. Tað kundi hjálpa limum at fáa viðurskifti í rætt lag. So ella so hevur tað ávirkað at vaksa upp í einum umhvørvi, har fakfelagsarbeiði fylti nógv. Birna hevur harumframt sitið í stýrum, nevndum, áhugabólkum og øðrum síðan hon var tannáringur. Hon sigur seg vilja verja rættvísi, og eri ikki bangin fyri at siga sína hugsan, og samstundis royna at finna semjur við tey, sum hava eina aðra hugsan.**

## Vit mugu verja vunnin rættindi

Stýrið og forfólk í YF hava øll árini vart vunnin rættindi. Tað hevur stóran týdning, at vit halda fram við hesum. Vit skulu samstundis royna at fáa betri sømdir í samráðingum. Tað er umráðandi, at YF og onnur fakfeløg seta dagsskránna í samfelagskjakinum og upplýsa um fakið, sum viðkomandi felag varðar av. Til at seta dagsskránna mugu vit sum fakfelag vera sjónlig og tosa um okkara fak, sum er námsfrøði, læring, undirvísing og eftirmeting, og hví tað hevur so stóran týdning. Um vit ikki gera tað, kunnu vit vera vís í, at eingin annar ger tað fyri okkum.

Serliga týdningarmikið er, at fólk sum heild síggja, hvussu fjølbroytt okkara fak er, og ikki minst, hvussu týdningarmikil liður tað er í samfelagnum. Í einum vitanarsamfelag eiga vit at brúka orku og pengar til útbúgving.

Í danskari bókmentasøgu undirvísa vit í bókmentum frá víkingatíð – vit tosa um eina bókmentasøgu í meir enn 1.000 ár. Eitt tíðarskeið í hesi søgu er *Nýbrotið*, ið fevnir um 30 ár í 19. øld, men sum hevur broytt sera nógv í teimum tonkum, vit hava um bókmentir og samfelagið sum heild. *Nýbrotið* gjørdi upp við romantikkin, m.a. vórðu orð sett á sosiala neyð, umstøður hjá kvinnum, lygn og kávalæti. Dupultmoralur í heimalívi og handilslívi skuldi avdúkast. Eitt nýtt samfelag skuldi byggjast upp.

Eg síggi tíðina, sum tey ungu brúka í miðnámsskúla, sum eitt *Nýbrot*. Næmingarnir ganga her í 2-3 ár, av teimum 83 árunum, tey í miðal liva, men hesi árini eru sera týdningarmikil og grundleggjandi fyri teirra útbúgvingarligu og menniskjasligu menning.

Vit lærarar eru tey, sum vísa teimum nýggjar heimar bæði í skúlastovuni og uttan fyri hana. Miðnámsskúlin ger tey klár til lívsins útbúgvingarligu ferð og hevur avgerandi týdning fyri restina av lívinum. Eg haldi tískil, at tíðin er komin til, at vit gerast meira sjónlig, so vanligi føroyingurin og politikarar síggja og virðismeta, hvønn týdning vit hava sum fakbólkur.

## Avbjóðingar á miðnámi

Størstu avbjóðingarnar á økinum eru, at vit sum samfelag eiga at halda fast í teimum gymnasialu virðunum. Vit liva í einari tíð, har alt gongur við nógvari ferð, men vit gloyma ofta, at skalt tú duga okkurt, mást tú brúka tíð til at fordjúpa teg í tað. Tað krevur sveittabrot og nógvar tímar við terping at læra truplar formlar, at læra nýggj mál, at greina samfelagslig viðurskifti, at tulka bókmentir o.s.fr.

Síðani 2013, tá ið vit fingu nýggja miðnámsskúlakipan og nýggjan sáttmála, hava lærarar verið noyddir at renna skjótari fyri somu løn. Nýggi sáttmálin varð gjørdur fyri at spara samfelagnum pengar, men spurningurin er, hvussu nógv tú sparir, tá ið tú vilt hava ”meira fyri minni”?

At venda aftur til tað gamla er helst ikki ein gongd leið, men spurningurin er, um tíðin ikki er búgvin, at vit endurskoða skipanina við einum politiskum vilja til at gera teir batar, sum ein tílík endurskoðan kemur fram til.

Í 2018 var ein bólkur settur at eftirmeta gymnasialu skipanina, men vit, sum starvast á økinum, hava ikki sæð serligan politiskan vilja til at brúka eftirmetingina at endurskoða skipanina. At einstøk landsstýrisfólk vilja okkara øki væl, flytur so lítið, tí broytingar innan útbúgvingarøkið krevja breiðar politiskar semjur, sum halda leingi.

## Avbjóðingar hjá miðnámsskúlalærarum

Hjá miðnámsskúlalærarum er størsta avbjóðingin vantandi virðing fyri yrkinum. Eg haldi ikki, at politikarar og fólk sum heild vita, hvussu tung byrða okkara er, og hvussu týdningarmikil samfelagsuppgávan er, vit varða av.

Næmingar broytast, samstundis sum tíðirnar broytast, og har mugu vit fylgja við. Krøvini til einstaka læraran eru økt munandi, samstundis sum at vit fáa fleiri og fleiri næmingar við fakligum, persónligum ella sosialum avbjóðingum.

Í undirvísingarstøðuni stendur tú sum lærari á tveimum beinum – tú hevur tína fakligheit (í lærugreinum og námsfrøði), og harafturat hevur tú sambandið við næmingarnar og flokkarnar.

Talið á næmingum við avbjóðingum er vaksandi, og tey hava í størri mun tørv á ein-til-ein sambandi við læraran, og tíðum hendir tað, at foreldur seta seg í samband við

lærarar. Hetta sást tú ikki fyri bara nøkrum fáum árum síðan. Arbeiðsbyrðan hjá lestrarvegleiðingini og lærarum er økt munandi í hesum sambandi. Hvørki lestrarvegleiðarar ella lærarar fáa hægri samsýning fyri hesa øktu arbeiðsbyrðu. Hetta mugu vit sum fakfelag gera nakað við.

Læraraleikluturin flytur seg sostatt á sama hátt, sum umstøðurnar rundan um okkum broytast, men regluverk og sáttmáli fylgja ikki altíð við, og hetta er ein tann størsta avbjóðingin hjá okkum.

Tí kunnu vit siga, at um politiska skipanin ikki skjótt fer at fáa eyguni upp fyri, at eitt vitanarsamfelag krevur sera høga raðfesting av undirvísing, verður samfelagið sum ein bókmentasøga við ongum *Nýbroti*.